


Tann rætta tónlistarliga jólagávan....

Endiliga komin aftur....

BOX-settið hjá Frændum fyri **bert 299,-**

Fæst kring landið

**expert** – vit vita


Starvslýsing

Heimatænastan

## Endurlýsing eftir Deildarleiðarum til Heimatænastuna í Suðurstreymoy - øki 1

Heimatænastan í Suðurstreymoy søkir eftir deildarleiðarum.

Heimatænastan í Tórshavn er býtt í 3 økir, Vestur-, Eystur- og Miðøkið. Í hvørjum øki er ein tvørfakligur bólkur av starvsfólki við heilsuhjálparum, heilsurøktarum og sjúkrarøktarfrøðingum. Til hesar tvørfakligu bólkarnar sóknast vit eftir 3 deildarleiðarum.

Deildarleiðarin hevur dagligu leiðsluna av einum tvørfakligum bólki og samstarvar í toymi saman við hinum deildarleiðarunum og deildarleiðaranum fyri sambýlini.

Deildarleiðararnir eru undir leiðslu av økisleiðaranum. Uppgávan verður, saman við starvsfólkunum og leiðslutoyminum at skipa eina samansjóðaða tænastu, har vit við umsorgan stuðla undir virkisførleika og vælveru hjá tí einstaka borgaranum.

**Vit vænta av tær at tú**
- Hevur útbúgving innan heilsurøkt
- Hevur hug og hegni at leiða og fyrisita
- Evnar at samstarva við bæði brúkara, avvarðandi, starvsfólk og leiðslu
- Hevur telduførleika á brúkarastøði
- Royndir og útbúgving í fyrisiting og leiðslu er ein fyrimunur

**Sum deildarleiðari hevur tú ábyrgdina av**
- Dagligu leiðsluni og fakligu ábyrgdini av veittum tænastum.
- At leiða, stuðla og menna starvsfólki
- At virka verður innan givnar fíggjarkarmar

**Vit kunnu bjóða**
- Eitt dynamiskt og fjølbroytt starv
- Eitt jaligt og vinarligt arbeiðsumhvørvið
- Eitt starv við nógvum avbjóðingum
- Fakliga og persónliga menning

**Setanartreytir**
Lønar og setanartreytir eru sambært sáttmála við Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Um tú ynskir at vita meira um starvið kann tú venda tær til Ceciliu Vestureið, økisleiðara, ceciliav@naerverk.fo, tlf. 31 72 49 ella 21 72 49

**Umsókn**
Umsóknin skal sendast og stílast til:

Nærverkið
Meginskrivstovan
Argjavegur 26
100-Tórshavn
Stílað: Gunnleyg Durhuus, leiðari
Viðmerkt: umsókn

**Umsóknarfreist 8. januar 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo





Bryggjubakki 16
FO-100 Tórshavn
Tel 30 82 82
Fax 30 82 81
info@norlink.fo

NORLINK

Magnus Heinasonargøta 23. 1
Postboks 205 · FO-110 Tórshavn
Tel 318903 · Fart. 505300
Fax 318703 · www.rannteld.info
rannteld@rannteld.info



*Vit ynskja viðskiftafólki, vinum og kenningum eini gleðilig jól og eitt eydnuberandi nýggjár og takka fyri gott samstarv í brátt farna ári.*

*Bókhaldsvirkið RannTeld*
*Ulla & Atli*

bókhaldsvirkið RannTeld

Veitst tú eina góða?

Ring til Sosialin tlf 341800

